# Atlantic Airways keypt nýtt flogfar

*Nýggja flogfarið hjá Atlantic Airways lenda í Vágum seinnapartin fríggjadagin klokkan 14.00. Nýggja flogfarið er av sama slag, sum gamla flogfarið hjá Atlantic Airways. Flogfarið er keypt úr Bretlandi fyri góðar 50 mió. krónur. Íløgugrunnurin er við í fíggingini av nýggja flogfarinum*

ÓLAVUR Í BEITI



Tummas Jacobsen og Jákup Eli Jensen, mekanikarar, Magni Arge, stjóri, Hans Hansen, Meinhard á Høgabóli og Oddmar á Høgabóli flogskiparar, tá nýggja flogfarið kom í Vágar seinnapartin í gjár

Mynd: Jens Kristian Vang

Í gjár beint eftir kl 14 lendi nýggja flogfarið hjá Atlantic Airways lenda á flogvøllinum í Vágum. Líkindini vóru ikki av teim bestu, so ivasamt var, um flogfarið fór at lenda. Flogfarið er av sama slag, sum gamla flogfarið hjá Atlantic Airways, eitt British Aerospace 146-200 flogfar.

Ætlanin var, at løgmaður, Anfinn Kallsberg, skuldi taka ímóti flogfarinum, men honum barst frá. Við flogfarinum, var samferðslumálaráðharrin, Finnbogi Arge, sum var umboð landsstýrisins á móttøkuna. Eisini Magni Arge, stjóri í Atlantsflog var við flogfarinum.

Leingi hevur verið í umbúna at keypa annað flogfar, tá ið kortini er neyðugt hjá Atlantic Airways á hvørjum ári at leiga eitt flogfar aftrat til summarhálvuna til tess at røkja ferðasambandið við útheimin á brúkligum støði.

**Leigast út**

Í samrøðu við Internet Sosialin beint fyri klokkan 20 hóskvøldið dugdi Magni Arge, stjóri í Atlantsflog, ikki at siga endaliga, um tað fór at eydnast flogfarinum at lenda til ásettu tíð fríggjadagin, men arbeitt varð fram ímóti tí - bert onkur smáting restaðu í.

Eitt nú var arbeitt við, at flogfarið longu mánadagin skal leigast út til summarflúgvingin hjá Atlantsflog byrjar í juni. Longu fríggjakvøldið skuldi flogfarið avstað aftur at flúgva fyri eitt størri flogfelag í Evropa. Endaligur sáttmáli var undirskrivaður, áðrenn blaðið fór til prentingar og áðrenn flogfarið setti kós móti Føroyum, men ikki fekst at vita, hvat felag talan er um, og floglíkindini vóru, sum longu nevnt, heldur ikki av teim bestu, so ivasamt var, um flogfarið fór at lenda.

**Fyrsta túrin 2. februar**

Magni Arge, stjóri í Atlantsflog, flogternur, flogskiparar og mekanikarar vóru farin yvir til Onglands at flúgva flogfarið til Føroya, haðani tað er keypt fyri góðar 50 mió. krónur. Flogfarið er bygt í 1985 og fleyg upprunaliga í USA.

Seinastu árini hevur tað flogið fyri bretska felagið Debon Air. Fyrsta túrin síðan yvirtøkuna fleyg flogfarið 2. februar úr Stansted uttan fyri London, har tað hevur verið til eftirlit og umvæling, til Manchester.

Við í fíggingini av flogfarinum er Íløgugrunnurin, sum tann 15. desember í fjør játtaði Atlantic Airways fígging.

Móttøka var í Hangarinum á Flogvøllinum klokkan 16 í sambandi við, at Atlantic Airways fekk nýggja flogfarið.

# Seinastu sýningarnar av Móðir Sjeystjørnu



Seinastu sýningarnar av Móðir Sjeystjørnu – ein tónleikamynd, verða nú á leikhúsinum hjá Grímu á Gamla Meiarínum í Tórsgøtu.

Leikurin byggir á skaldsøguna hjá William Heinesen við sama navni.

Sýningar fara fram sum lýst í útvarpi og bløðum.

Leikurin er sera væl umtóktur og hevur fingið sera góð ummæli. Fullsettar skúlasýningar eru um dagarnar og neyðugt hevur verið við eyka skúlasýningum alla hesa vikuna. Almennu sýningarnar eru eisini væl vitjaðar. Higartil hava umleið 2500 fólk sæð leikin.

Leygarkvøldið verður spælt kl. 17.00 og sunnudagin kl. 16.00. Soleiðis er eisini møguleiki hjá avbygdafólki at sleppa til hús aftur eftir sýningina. Tað verður ikki farið á bygd við leikinum Móðir Sjeystjørna. Atgongumerki kostar kr. 100,00, men bólkar yvir 20 fólk fáa avsláttur. Eisini ber til hjá virkjum og stovnum at keypa sýningar. Meira fæst at vita um hetta frá Grímu ella Kunningarstovuni.

Leikurin viðger tey afturvendandi menniskjansligu fyribrigdini, bardagan millum lív og deyða, tað tímiliga og tað æviga, dreym og veruleika, kærleika og vón og mangt, mangt annað. Teodor E. D. Olsen skrivar millum annað hetta í Sosialinum 18. jan.: »Men størstur er hóast alt kærleikin, og eins og tokkin til leiklistina ivaleyst hevur drivið verkið hjá Grímu, eiga vit eisini at vera góð við okkara yrkisleikbólk, sum enn einaferð hevur ríkað okkum við einum góðum leiki«.

Pallmyndin hjá Elisu Heinesen er einfald, men sera spennandi og nýskapandi, og gevur saman við ljósinum leikinum aðra vídd, enn vit vanliga eru von við. Elin Michelsen skrivar soleiðis um pallmyndina í Dimmalætting 20. jan. »Til at byggja myndina fær søgan góða hjálp av pallmyndini, sum eins og fólkini í leikinum, hevur so nógvar loynidómar, sum verða avdúkaðir so við og við, og hetta hevur við sær, at áskoðararnir ikki kunnu hyggja burtur eina einastu løtu«.

Plakatin til leikin er klippið hjá William til bókina, og hevur Elisa eisini gjørt nýtt lay-out til myndina, so úrslitið er sera vøkur, litrík plakat, sum fæst til keyps í bókabúðunum og í sambandi við sýningarnar.

Tónleikurin og ljóðmyndin hjá Stamen Stantchev gevur eisinileikinum sín serliga hugtakandi dám.


